# TÓGV

**til maskinbinding / hondbinding**

Vit hava nógv spennandi og gott tógv á spolum, bæði til maskin- og hondbinding. *Til dømis:*

- ✔ **Júnik 100% ull**
- ✔ **Blandað ull/silki**
- ✔ **Merino ull**
- ✔ **Kamgarn**
- ✔ **Mohair**
- ✔ **Og annað spennandi effekttógv**

**Hondarbeiðsbúðin**

Dr. Jacobsensgøta 5 - Tel. 310 925

# Til sølu

## Mazda 323 Sedan



**Lagalig fígging**

**Útgjald bert kr. 15.000,-**
**Restina práta vit um**

Árg.: 8/1996
Í góðum standi - Ný sýnaður
kr. 55.000,-

Opið leygardagin frá 11 - 15
Sí meira á www.bilfridkan.fo

**Bilfríðkan á Hjalla**

Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging

# Søkt verður eftir fólki

til bygdarhúsið á Strondum at byrja sum skjótast.

Tann, ið settur verður, skal taka sær av rakstrinum av húsinum, m.a. matstovuni, reingerð og útleigan av hølum.

Løn samb. avtalu.

Møguligar umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2005

Kommustýrið tilskilar sær rætt til at velja millum umsøkjarnar ella ongan at seta.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10**
**490 Strendur**

# Fróðaskaparsetri søkir eftir telduvørði

**Telduvørður**
Av tí at telduvørðurin hjá okkum fer víðari til aðrar avbjóðingar, søkja vit eftir telduvørði at byrja skjótast til ber.

Telduvørðurin hevur ábyrgdina av, at teldurnar virka nøktandi í dagliga arbeiðinum, og at data verða goymd og brúkt á skilabesta hátt. Vit rokna við, at tú hevur royndir við teimum vanligastu KT-forritunum og ert vanur at vegleiða brúkarar í nýtsluni av teimum. Tú hevur viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir, ert íðin og hevur áræði og góð samstarvsevnir.

Dagliga arbeiðið hjá telduvørðinum fevnir millum annað um at

- seta upp og innleggja Windows og Linux stýriskipanir á brúkarateldir
- innleggja nýtsluforrit (Office pakkan, Novell Netware klient og Novell GroupWise klient)
- taka trygdaravrit og at endurskapa dáta á lokalum ambætarum og teldum
- innleggja brúkaraskipanir á deildunum
- viðlíkahalda brúkarateldur, so at frammanfyri nevndu forrit virka

Ein stórur partur av arbeiðinum verður framt á teimum ymsu deildunum á Fróðskaparsetrinum.

**KT-økið**
KT-økið fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novell Netware netskipan og Novell GroupWise postskipan. Umsøkjarar við hollum kunnleika til hesar skipanir hava fyrimun. Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar.

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Nærri upplýsingar um starvið og um arbeiðsuppgávurnar kunnu fáast við at venda sær til Hans Birgir Højgaard, KT-leiðara á telefon 352570 ella teldupost: birgirh@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 30. mars 2005. Starvið verður sett skjótast til ber.

**Seturskrivstovan**
J.C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-100 Tórshavn

# Eysturoyar Eystara Bjargingarfelag

Aðalfundur felagsins verður mánadagin 4. apríl.

Tíð og stað verður lýst seinni.

**Nevndin**

# Sosialráðgevi

Eitt starv sum avloysari fyri sosialrágeva í farloyvi er leyst at seta skjótast gjørligt og inntil 4. november 2005.

Á økisdeildini í Havn arbeiða 14 fólk: 8 sosialráðgevar, 5 málsviðgerar og deildarleiðari.
Økið hjá deildini er Streymoy, Vágar, Mykines, Nólsoy, Hestur, Skúvoy og Sandoy. Starvið kann innibera ferðing.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki**
- at ráðgeva og vegleiða borgarum í økinum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa áheitanum til landsumfatandi deildirnar hjá Almannastovuni

**Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av, eru**
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir uppihaldshjálp og stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til fyritíðar- og fólkapensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensiónir

**Førleikakrøv**
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni til umstilling og at tola stórt arbeiðstrýst til tíðir
- evni og vilja til at arbeiða tvørfakligt og í heildarloysnum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðara á tlf. 353570.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast Almannnastovuni, J. Broncksgøta 27, postsmoga 3096, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 2. apríl 2005.

---

*Um Almannastovuna*
*Almannastovan er skipað við almannamiðstøðum í Tórshavn, í Suðuroy, í Eysturoy og í Norðoyggjum, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Harumframt eru Hjálpartólamiðstøðin og aðrar landsdekkandi serdeildir partar av Almannastovuni.*

*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*

*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*

*Stovnurin umsitur 800 mill. kr. og vit eru íalt 90 fólk í starvi.*

Sosialurin